KÍ-Sumba 0-1 (0-0)

# Gestirnir fingu einasta málið

**Bæði liðini høvdu møguleikar at gera mál, so kom bert eitt mál í dystinum. Hetta málið fekk Sumba, hóast KÍ hevði yvirvág í spæli í seinna hálvleiki**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Sumba og KÍ spældu ein tættan dyst í Klaksvík leygardagin, og hóast møguleikar vóru til fleiri mál, so fór bólturin bara einaferð um málinjuna.

Tað var tá slakir 15 minuttir vóru eftir at spæla. Jan Poulsen snýtti ein verjumann í vinstru og legði ein høgan bólt inn í brotsteigin. Við aftaru stong trokaði René Thomsen seg fram at, og hann setti fótin undir bóltin fyrstu ferð. Bólturin endaði í málinum, og so var stór frøi á sumbingum.

KÍ noyddist at vinna dystin, skuldi liðið sleppa undan at spæla niðurflytingardyst, og hóast klaksvíkingar vóru ídnir megin-partin av tíðini, so var hepnið ikki við teimum.

Fyrri hálvleikur var javnur. Sumbingar høvdu yvirvág í løtum, men heimaliðið var allatíðina væl við og spældi seg til kjansir.

Fleiri royndir mans vóru á KÍ-liðnum, og umframt John Ryan, Olgar Danielsen, John William Joensen og Eyðun Klakstein var veteranurin Beinur Poulsen eisini á liðnum. Hann spældi í 70 minuttir á miðvøllinum og stóð seg væl.

Hjá Sumba vóru tað serliga Jan Poulsen og Sasa Tomajek, sum gjørdu um seg. Teir spældu á sentrala miðvøllinum, og alt spælið hjá sumbingum koyrdi ígjøgnum teir. Evnaríki Mortan í Hørg hevði ikki ein av sínum góðum døgum hesaferð.



*Klaksvíkingar høvdu nógv spæl ímóti sumbingum, men gestirnir fingu tó einasta málið, sum kom í dystinum*

*Mynd: Aleksandar Djorovic*

### KÍ trýsti

Í fyrra hálvleiki høvdu bæði liðini møguleikar. Hjá KÍ royndu John Ryan og Eyðun Klakstein seg úr góðum støðu, men báðu ferð bjargaði málverjin. Sama var skilið í hinum endanum, har John William Joensen spældi væl.

Í seinna hálvleiki setti KÍ seg alt meira á dystin, og í løtum var talan um gott og flótandi spæl út í síðirnar og fram eftir vøllinum. Tað lá í luftini, at heimaliðið fór at skora, og royndirnar vóru naskar.

Sum dysturin leið linkaði trýstið á Sumba-málið nakað, og mitt í øllum vóru tað gestirnir, sum fingu mál burtur úr so at siga ongum. Eftir málið setti Sumba seg á dystin, og tað tóktist, sum heimaliðið fall í fátt. John William Joensen noyddist seinastu løtuna at bjarga royndum frá Mortan í Hørg og Sasa Tomajek.

Ikki fyrr enn seinastu minuttirnar kom nakað av lív aftur í heimaliðið, og nøkur hornaspørk upp í slag skaptu trupulleikar í Sumba-brotsteiginum. KÍ fekk stóran kjans at javna, men Poul Juul Wilhelmsen rakti ikki bóltin, sum helst skrúvaði og sprakk skeivt, tá hann kom at standa væl fyri.

Endin var, at Sumba vann dystin, og harvið noyðist KÍ at spæla um plássið í 2. deild. Og tað skulu teir eftir øllum at døma gera í tveimum dystum ímóti Royn.

**KÍ-Sumba 0-1 (0-0)**
0-1: Rene Thomsen

## Beinbrotin



*Skaðarnir hava regnað oman yvir HB í alt ár. Nú er eisini Bárður Johannesen somikið illa skaddur, at hann ikki verður á vøllinum aftur hetta kappingarárið*

**Óhappini í HB tykjast ongan enda at taka. Nú er tað Bárður Johannesen, sum hevur brotið eitt bein niðri við øklaknútin**

SKAÐAR
*Jákup Mørk*

Kappingarárið hjá HB hevur verið ein sonn marra higartil. Liðið er í vanda fyri at røkka einum søguliga vánaligum úrsliti, og fremsta orsøkin til hetta eru skaðarnir, sum at kalla hava regnað oman yvir liðið.

Sostatt eru tað bert tríggir av teimum leikarum, sum vanliga verða roknaðir sum fastir í hópinum, sum ikki hevur verið raktir av drúgvum skaðum hetta kappingarárið.

Seinasta skotið í so máta fekk HB, tá teir mikudagin spældu útsetta dystin móti GÍ í Gøtu. Miðskeiðis í seinna hálvleiki mátti málverjin, Bárður Johannesen, hjálpast av vøllinum, eftir at hann hevði verið í nærdysti við ein mótleikara.

Fyrst varð hildið, at talan helst var um onkran vøddaskaða niðri móti øklaknútinum, men røntgen-kanningar hava síðani staðfest, at talan er um brot, og er Bárður sostatt endaliga úti fyri restina av hesum kappingarárinum.

Í HB munnu tey valla vita, hvørt tey skulu flenna ella gráta um skaðasóttina, sum hevur rakt liðið so meint í ár, men tey kunnu í øllum førum staðfesta, at gjørdist ikki árið, har felag teirra var lutur í oddastríðnum.

# Heilt nær



*Jákup á Borg er enn ikki vísur í, um hann verður tøkur til dystin móti HB komandi vikuskifti*

**Jákpu á Borg ásannar, at B36 nú er heilt nær einum gullmerki, men minnir tó á, at stig framvegis skulu til**

GULL-ROYKUR
*Jákup Mørk*

Hóast teir væl vita, at bitan ikki skal kannast, áðrenn hann er svølgdur, so skerst ikki burtur, at teir í B36 nú halda seg vera heilt nær gullmerkjunum, sum bæði leikarar og viðhaldsfólk hava mest sum snoddað til alt árið.

Sunnukvøldið fingu vit orðið á Jákup á Borg, sum so avgjørt hevur verið ein av lyklaleikarunum hjá B36 í ár, og hann hevði í øllum førum trupult við at krógva optimismuna, sum nú er í B36-leguni.

- Eg má viðganga, at vit eftir hetta umfarið eru komnir øgiliga nær FM-heitinum, men enn eru ikki allar súður syftar. Vit hava framvegis tveir sera truplar dystir eftir, og vit skulu so fáa okkurt burtur úr teimum, um tað skal eydnast, sigur hann.

### Ikki av sær sjálvum

Tað verður sagt ofta um oddalið, at tey skulu hava tað neyðuga hepnið, um gullið skal gerast veruleiki, og B36 hevur ikki á nakran hátt verið undantakið, sum staðfestir regluna.

Ikki minst hevur tað riðið um snarið trý tey seinastu umførini, og umframt at B36 onkursvegna hevur koppað øllum til egnan fyrimun, hevur lagnan eisini vilja tað soleiðis, at gøtumenn í tveimum førum eru snávaðir at kalla um sama mundið.

- Tú kanst væl siga, at vit hava verið øgiliga hepnir, men hinvegin fylgir hepnið aloftast við teimum góðu liðunum. Tað er jú ikki soleiðis, at hepnið bara kemur av sær sjálvum. Tað skal uppsøkjast, og tað haldi eg eisini, at vit hava gjørt. Allir leikararnir hava alla tíðina trúð upp á møguleikan, og allir hava alla tíðina arbeitt fyri honum, sigur Jákup á Borg um hendan partin av spælinum.

### Missir kanska HB-dystin

Komandi dysturin hjá B36 verður grannauppgerðin móti HB, og óneyðugt er helst at siga, at tað nærum er ein ynskisdreymur hjá leikarunum, um teir megna at vinna sær FM-heitið í dysti móti grannunum. Hinvegin ætla teir í HB sær uttan iva at hava eitt orð at siga hesum viðvíkjandi, so tað er av sonnum lagt upp til stórdyst í Gundadali, líka mikið, hvat stigatalvan sigur um munin millum liðini.

Tað kann tó vera, at B36 noyðist at vera Jákup fyri uttan til hendan dystin. Lærutíðin krevur sína skúlagongd, og tá hendan fer fram í Danmark, er tað í løtuni ógreitt, hvørt landsliðsmaðurin kann fáa frí frá skúlagongdini, soleiðis at hann kann koma heim at spæla.

- Sum er dugi eg ikki at siga, um eg verið við til tann dystin. Eg kann ikki annað enn vóna, at tað onkursvegna kemur í rættlag, men sum sagt, so eri eg als ikki vísur í, at tað fer at bera til hjá mær at fáa frí, sigur Jákup á Borg at enda.



# Brøndby nógv meiri sannførandi enn FCK

**Lagið í meistaraliðnum er einki serligt, og tað tykist sum nýggi venjarin hevur stóra avbjóðing at taka sær av**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*10 stig eru nú ímillum Brøndby og FCK*

Tað var góður hýrur í Brøndby sunnudagin. 28.116 áskoðarar vóru kring vøllin, og karmurin var, sum hann eigur at vera. Men spælið var einki at reypa av, tá Brøndby hevði vitjan av FCK. Talan var um nógvar nærdystir og um nógvar taktiskar bindingar, og tískil var talan ikki um serliga nógv av poleraðum og fínum fótbóltsspæli.

Eingin ivi var um, at tað var heimaliðið, sum var betri fyri. Hjá FCK sleit Todi Jónsson seg nakrar ferðir til hálvar og fjórðings møguleikar. Zuma, sum tað hevur verið sagt og skrivað so nógv um seinasta hálva árið, tóktist slitin og erkvisin, á miðvøllinum var spælið ikki so skipað, sum tað hevur verið, í verjuni vóru óbøtandi mistøk, og málverjin var óstøðugur.

Eingin sigur tað beinleiðis, og Todi Jónsson vil yvirhøvur ikki koma inn á tað, tá vit fregnast hjá honum. Men tað tykist sum um, at fleiri av spælarunum, sum vóru við til at vinna DM í summar, nú leingjast eftir nýggjum avbjóðingum. Árið við Roy Hodgson var framúr, og síðani hevur verið nógvur turbolensur. Um FCK skal koma fyri seg nú beinanvegin, so skal Hans Backe vísa serlig evni.

Brøndby kom á odda í 25. minutti. Ruben Bagger skoraði, og fráfarandi FCK venjarin, Niels Christian Holmstrøm, kallaði eftir dystin ein spaka fyri ein spaka. Hann peikaði á miðverjan Kim Madsen, sum hann helt í sambandi við málið hava gjørt tvey so grov mistøk, sum ikki eiga at koma fyri á hægsta støði, og liðfelagin hjá stakkals manninum, Jakob Laursen, gav venjaranum rætt.

Svenski FCK málverjin, Magnus Kihlstedt, var ikki sannførandi í sambandi við 1–0 málið. Í 2. hálvleiki gjørdi málverjin tað gott aftur. FCK spenti álopsbogan, uttan at tað gjørdist serliga vandamikið. Hetta hevði við sær, at Brøndby fekk fleiri góðar møguleikar, men FCK málverjin var tryggur.

Í yvirtíðini skoraði Brøndby fyri aðru ferð, og nú eru tíggi stig frá FCK og fram til Brøndby.

### AaB hongur í

Besta boðið upp á DM uttanfyri Keypmannahavn er AaB, sum eisini hesa ferð gjørdi sítt. AaB var í Silkeborg, har tað stendur heilt illa til, eftir at teir hava selt fleiri av stuðulsspælarunum. Eydnan er sjáldan við teimum veiku, plagar at verða tikið til, og soleiðis var tað eisini í hesum dystinum. AaB var sera heppið at fáa sigursmálið í síðstu løtu.

Í Odense hekk lívið hjá OB venjaranum í heilt klønum tráði. Men í síðstu løtu eydnaðist tað upp á brotsspark at javna til 2–2 ímóti AB, og harvið eitur OB venjarin – í hvussu so er eina viku afturat – Troels Bech.

Esbjerg tapti fyri stuttum 7–0 á heimavølli ímóti Brøndby. Síðani tá hevur gingið sum eftir ánni. Sunnudagin vann Esbjerg 2–0 í Viborg, og nú er felagið hjá Christian Høgna Jacobsen uppi undir teimum ovastu.

Vejle hevði møguleikan at fáa øll stigini ímóti FCM. Men í evstu løtu misnýttu teir eitt brotsspark, og so var úrslitið 1–1.

Í gjárkvøldið skuldu Lyngby og AGF spæla. Felags fyri hesi bæði feløgini er, at tey eru í sera stórum fíggjarligum trupulleikum.

# Todi er aftur vøddaskaddur

**Føroyski álopsmaðurin sleppur ikki upp í part, tá FCK í vikuni skal royna seg í Europa Cup**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*– Eg skuldi spurta og kendi, at tað dragnaði í lærinum. Tíverri var talan um ikki ókenda støðu, og tí var einki annað at gera enn at biðja um at verða skiftur úr, greiðir Todi Jónsson frá*

Fyrrapartin í gjár hitti nýggi FCK venjarin, Hans Backe, spælararnar hjá sær fyri fyrstu ferð. Teir hava ikki nógva tíð at lora av. Hóskvøldið skal FCK spæla í UEFA Cup á heimavøllinum í Parkini.

Eingin ivi er um, at Hans Backe fegin hevði viljað havt Toda Jónsson ímillum teir fyrstu ellivu hóskvøldið. Í hvussu so er hevur hann leingi havt gott eyga á føroyska álopsmanninum.

Nýggi svenski FCK venjarin kom til Keypmannahavnar leygarkvøldið. Sunnudagin var hann ímillum teir 28.116 áskoðararnar í Brøndby, og har fekk hann staðfest, at sjálvt um tað ikki gekk nakað serligt hjá FCK, so var Todi væl upplagdur. Í donsku pressuni verður Todi sagdur at vera tann einasti FCK maðurin, sum rættuliga gjørdi um seg í 1. hálvleiki.

At vit siga, at Hans Backe leingi hevur havt gott eyga á Toda, verður ikki tikið úr leysum lofti. Tá nýklæktu DM vinnararnir úr AaB spældu vígsludyst á Tórsvølli i 1999, var Hans Backe venjari. Hjálparvenjari hjá honum var Lars Søndergaard. Stutt frammanundan hevði AaB keyp Andres Oper úr Estlandi. Lars Søndergaard visti tá at siga, at AaB hevði havt áhuga í at keypa Toda, men hann var var ov dýrur at keypa úr FCK, segði hjálparvenjarin hjá Hans Backe fyri tveimum árum síðani.

### Aftur á bríkina

Men Hans Backe fær ikki møguleika at hava Toda Jónsson í FCK álopinum hóskvøldið.

Tað tykist eingin endi vera á, hvussu illa tað roynist við skaðum hjá Toda Jónsson. Sunnudagin noyddist Todi, sum dygst undan steðginum hevði fingið gula kortið, at biðja um at verða skiftur út, og so fekk Heine Fernandez møguleikan síðstu minuttirnar.

– Eg skuldi spurta og kendi, at tað dragnaði í lærinum. Tíverri var talan um ikki ókenda støðu, og tí var einki annað at gera enn at biðja um at verða skiftur úr, greiðir Todi Jónsson frá.

*Hvussu leingi roknar tú við tað verður, inntil tú verður tøkur aftur?*

– Sovorðið tekur sína tíð. Eg gangi bara út frá, at tað verða tvær ella tríggjar vikur, men eg veit tað ikki.

*Nú kemur tað ofta fyri, at tú ert vøddaskaddur?*

– Hesi bæði seinastu árini hevur tað verið alt ov ofta. Tað er ørkymlandi, og tað tykist ikki, sum at tað er nøkur fyribyrgjandi viðgerð fyri hetta. Men soleiðis er tað, og nú er einki annað at gera, enn aftur eina ferð at vera tolin og vóna tað besta, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

Hóskvøldið fer hann fyri aðru ferð í ár í Parkina at hyggja at, meðan liðfelagarnir stríðast í Europa Cup. Talan er um besta sýnisgluggan av øllum hjá teimum, sum vilja sleppa aðra staðni í Europa, har tað eru nógvir pengar at vinna í fótbóltinum. At tað ger ilt hjá øllum fótbóltsáhugaðum føroyingum, at Todi nú skal vera so óheppin, er sjálvsagt.